MENTAMÁLARÁÐIÐ

Dagfesting: 14. apríl 2016
Tygara ref.:
Máltal: 16/00719-4

## Vegleiðing til landsroynd fyri næmingar við serligum tørvi

Sambært § 8 í reglugerð um landsroynd skal skúlaleiðarin tryggja, at næmingar við serligum tørvi m.a. fakligum, sálarligum ella likamligum, fáa neyðugu amboðini, hjálpina og/ella stuðulin, teimum tørvar. Meginreglan er, at allir næmingar skulu til landsroynd.

Avgerð um, hvønn stuðul næmingurin skal hava, verður tikin í samráð við avvarðandi, Førleikastovuna og/ella Sernám.

Próvstovan nýtist ikki at vera fráboðað uttan so, at neyðugt er við tillagaðum uppgávum ella um ivamál eru.

Allur tekstur til Landsroyndina 2016 kann verða lisin við t.d. cd-orð ella orðabankanum.

Næmingar kunnu hava hjásitara. Hjásitarin skal stuðla, men skal vera so neutralur sum møguligt og skal ikki hjálpa at loysa fakliga innihaldið í uppgávuni. Leikluturin hjá hjásitaranum kann t.d. vera at lesa tekstin upp fyri næminginum og at stuðla honum, so hann fer í gongd við at gera uppgávurnar.

Næmingar, ið hava hjásitara, fáa 15 minuttir í longdari royndartíð.

Næmingar kunnu fáa 1/3 av royndartíðini lagda afturat royndartíðini.

Um næmingurin hevur fingið stuðul til landsroyndina, so verður hetta viðmerkt í næmingayvirlitinum, sum verður sent Próvstovuni.
.

**Mentamálaráðið**

Hoyvíksvegur 72 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
☎ +298 30 65 00 • 🖷 +298 30 65 55 • ✉ mmr@mmr.fo • www.mmr.fo